# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Brúdleyp**

Leygardagin 26. november giftast Molly Elisa Torbjørnsdóttir Jacobsen og Sjúrður Højgaard. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 15.00. Veitslan verður hildin í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 361805, 361119, 582058, ella 447215 áðrenn 19. november.

Leygardagin 26. november kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju, Doretha Hansen, Runavík og Karstin Joensen, Klaksvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448212, 456428 ella 220606 áðrenn 18. november.

Leygardagin 10.desember kl 14.00 giftast í Glyvra kirkju, Bodil Simonsen, Saltangará, og Petur Súni Jacobsen, Leirvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf 443176, 448051 ella 225941 áðrenn 28.nov.

**Silvurbrúdleyp**

Leygardagin 10. desember kunnu hjúnini Malan og Kristian Hansen í Nólsoy halda silvurbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327112 ella 580273 áðrenn 1. desember. Byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.30.

Týsdagin 10. januar hava Anita og Tummas Pauli Olsen, Syðrugøtu, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 7. jan. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 441795 ella 213912 í seinasta lagi 14. des.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 3. desember hava Jolina og Gabriel Hansen, Nólsoy, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327011 ella 327150 innan 18. november og byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.00.

Sunnudagin 4. desember hava Karla og Elias Olsen, Rituvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Sjókafeeini í Runavík, sunnudagin 4. des. kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í gullbrúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 449455, 448455 ella 263300, innan 27. nov.

Tann 4. desember hava Gertrud og Martin Gunnarstein í Vági gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á gistingarhúsinum í Øravík leygardagin tann 3. desember. Tey, ið vilja halda dagin saman við gullbrúðarparinum, kunnu siga frá á tlf. 373358 ella 373980 innan 20. november.

Leygardagin 31. desember hava Sunneva og Henning Johannesen á Argjum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum fríggjadagin 30. desember kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum hetta kvøldið, verða biðin um at siga frá á tlf. 315005 ella 313269 áðrenn 1. desember.

**90 ár**

15. november verður Hjørdis Brønholm, dóttir Kvívíks Tummas, 90 ár.

Adressan er: Ovengaden - Neden vandet 53, 4. sal til høgru, 1414 Keypmannahavn.

**70 ár**

Hósdagin 17. november verður Sólgerð á Rógvi Olsen 70 ár. Vælkomst verður leygardagin 19. november í Fjørukrónni í Vestmanna frá kl. 18.00.

Vinthor Durhuus, Tórshavn:

## 40 ára starvsdag hjá Føroya Tele



11. oktober 2005 hevði Vinthor Durhuus í Havn 40 ára starvsdag hjá Føroya Tele. Í hesum sambandi var hátíðarhald í Klingruni í Hoyvík fríggjadagin 11. november.

Vinthor, sum er vestmenningur, arbeiddi hjá el-felagnum SEV í Vestmanna, áðrenn hann flutti til Havnar í 1964. Hann arbeiddi eitt stutt skifti hjá byggifelagnum Lamhauge & Waagstein áðrenn hann kom í starv hjá Telefonverkinum. Hóast Vinthor øll árini hevur starvast á kaðaldeildini, er arbeiðið nógv broytt, serliga tilfarið í kaðalunum.

Fyrstu árini var alt telefonsamband innanoyggja gjøgnum luftlinjur og jørðkaðalar. Seinnu árini hava ljósleiðarakaðalarnir tikið meira yvir. Vinthor var við til at skoyta fyrsta ljósleiðarakaðalin í 1986.

Frá 1988-2003 var Vinthor formaður á kaðaldeildini. Hann er ein álitismaður, ið altíð møtir væl upp og gongur høgt upp í at alt er væl úr hondum greitt.

Vinthor dámar væl føroyskan dans, og var hann við til at stovna dansifelagið "Tøkum lætt", har hann er virkin limur.

Vinthor er giftur Britu, f. Rasmussen, úr Havn. Tey eiga tveir synir: Birni og Jón, sum báðir búgva í Havn. Abbabørnini eru 4 í tali, børnini hjá Birna eru: Johanna, Annika og Brita, og Jón eigur dóttrina, Helenu.




*Næmingarnir vóru sera væl nøgdir við at fáa eitt 13-tal fyri verkætlanina um dálking, f.v.: Bartal Henriksen, Gunnar Thomsen, Hans Hansen og Schønning Eysturoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 13-tal fyri verkætlan um dálking

Í sambandi við eina verkætlan hjá 9ð á Eystskúlanum í Havn fingu fýra næmingar í einum arbeiðsbólki eitt 13-tal fyri eina verkætlan um dálking

Grundgevingarnar fyri 13-talinum vóru m.a. at næmingarnir høvdu sett seg sera væl inn í evnið, svaraðu nógvum spurningum og høvdu framúr góðan málburð. Í bólkinum vóru Hans Hansen, Bartal Henriksen, Gunnar Thomsen og Schønning Eysturoy.

Teir fýra næmingarnir valdu evni "dálking", tí at teir hildu tað vera eitt spennandi og aktuelt evni. Dálking er nógv frammi í fjølmiðlunum nú á døgum. Vit hava dálkað sera illa, og nú fær hetta avleiðingar. Føroyar eru ein av heimsins mest dálkandi tjóðum pr. íbúgva, og teir í arbeiðsbólkinum settu sær fyri at finna útav hvar føroyingar dálkaðu mest, á landi, í havinum ella í luftini, og um vit gera nakað fyri at byrgja fyri hesi ógvusligu dálking.

Teir vóru t.d. hjá el-felagnum SEV og fingu góða hjálp frá Anders Nedergaard-Hansen, deildarleiðara, eisini vóru teir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Annars settu seg væl inn í evnið við at leita í bókum og á internetinum eftirupplýsingum. Næmingarnir høvdu eina viku um uppgávuna.